AGANEVNDIN

**KÆRA 2/2015**

| *FSF skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: KÍ kærir 07 Vestur fyri at nýta ólógligan leikara** | |
| Deild: U18 menn | Kapping: Landskappingin |
| Brot framt: 15.06.2015 | Aganevndin móttikið kæru: 1. juli 2015 |
| Kærugjald goldið: ja | Kærufreist hildin: ja |
| Partshoyring við 3 daga freist: ja | Starvsnevndin biðin um ummæli: |
| | Áheitan um munnliga viðgerð: nei |

# AGANEVNDIN

Í viðgerðini av málinum í Aganevndini hava hesir limir luttikið: Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur og forkvinna, Anni á Hædd, løgfrøðingur og næstforkvinna og Sissal Kj. Kristiansen, ráðgevi.

## 1. Úrskurður

Grein 8 í Agareglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's og ta skipan, sum er gjørd fyri brúk av spælarum.

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður 07 Vestur U18 menn dømdir at tapa dystin móti KÍ tann 15. juni 2015 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

## 2. Kærupástandir, partshoyringarsvar og møguligar viðmerkingar frá Starvsnevnd FSF's

KÍ hevur kært 07 Vestur fyri at nýta ólógligan leikara í dysti millum KÍ og 07 Vestur tann 15. juni 2015 í U18 deildini hjá monnum.

Í kæruni vísir KÍ á, at 07 Vestur hevur nýtt ein ólógligan leikara í dystinum tann 15. juni 2015, og at talan er um leikaran Fríða Joensen, sum hevur fingið 3 gul kort, og at leikarin sostatt er leikbannaður.

07 Vestur er hoyrt í málinum og hevur svarað FSF, at tað er ein feilur frá teirra síðu, at leikarin leikti, og at hvørki felag ella leikari høvdu gáa um, at leikarin hevði fingið 3 gul kort, og tískil átti at sita uttanfyri nevnda dyst. 07 Vestur vísir eisini á, at KÍ visti av hesum, áðrenn dysturin var bríkslaður í gongd, men valdu onki at siga, fyrr enn ov seint var hjá 07 Vestur at gera nakað.

## 3. Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið

Sambært grein 2, sbr. grein 5, stk. 3 og 5, sbr. grein 7, stk. 2 kann Aganevndin viðgera mál um møgulig brot á lógarverk FSF's. Sambært grein 5, stk. 3 í Agareglugerðini kann Kappingarnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina viðgera eitt mál sum kemur til hennara kunnleika. Sambært grein 7, stk. 2 í Agareglugerðini kann Starvsnevnd FSF's nær sum helst biðja Aganevndina um at viðgera eitt mál sum kærumál samsvarandi reglugerðini.

## 4. Fakta í málinum

Tann 15. juni 2015 varð dystur leiktur millum KÍ og 07 Vestur í U18 deildini hjá monnum.

Leikarin Fríði Joensen leikti fyri 07 Vestur í omanfyri nevnda dysti.

Sambært upplýsingum frá FSF umsitingini, hevði leikarin fingið 3 gul kort í landskappingini hjá U18 undan omanfyri nevnda dysti, og leikti hann tískil ólógliga í dystinum tann 15. juni 2015, tá KÍ og 07 Vestur leiktu dyst.

**5. Lógarverkið**

**Kappingarreglur fyri Fótbólt**

§ 37a. stk. 2.

Dómarin skal skrivliga boða Kappingarnevndini frá teimum ávaringum (gult kort) ið givnar verða.

Tá leikari hevur fingið 3 gul kort, fær hann 1 dag leikbann

Tá leikari harnæst hevur fingið 2 gul kort, fær hann 1 dag leikbann

Tá leikari harnæst hevur fingið 2 gul kort, fær hann tveir (2) dagar leikbann. Hvørt gult kort givið eftir hetta, gevur leikbann í ein (1) dag.

Leikbann eftir hesi reglu eru galdandi frá fyrst komandi leikdegi.

**6. Staðfestingar, metingar, o.t.**

Aganevndin kann staðfesta, at omanfyri nevndi leikari hevði 3 gul kort tann 15. juni 2015, sum ikki vóru sitin yvir og tískil leikti ólógliga í dystinum tann 15. juni 2015 millum KÍ og 07 Vestur sbrt. § 37a stk 2 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

**7. Niðurstøða**

Leikarin Fríði Joensen leikti ólógliga í dystinum millum KÍ og 07 Vestur í U18 hjá monnum tann 15. juni 2015.

**8. Úrskurður**

Grein 8 í Agareglugerð FSF's heimilar Aganevndini at geva feløgum og persónum sekt fyri brot á lógarverk FSF's. Brúk av ólógligum leikara er álvarsamt brot á regluverk FSF's og ta skipan, sum er gjørd fyri brúk av spælarum.

Við heimild í grein 8, litra h í Agareglugerðini verður 07 Vestur U18 menn dømdir at tapa dystin móti KÍ tann 15. juni 2015 fyri brúk av ólógligum leikara við málmuninum 0-3 sambært grein § 41 í kappingarreglunum fyri fótbólt.

**9. Upplýsing um kærumøguleika og freistir.**

Sambært grein 12, litra f í Agareglugerðini, kann avgerðin kærast til Yvirkærunevndina innan 5 dagar aftaná móttøku av úrskurðinum.

**10. Staður, dagfesting og undirskrift Aganevndarinnar:**

AGANEVNDIN

**Tórshavn 2. juli 2015**

Ingunn Ó. Eiríksdóttir, forkvinna